# Fyrsta finalan verður í Göteborg

**FCK vann finalupláss, tí Rosenborg tapti, tá ið teir í Malmö høvdu møguleikan at taka finaluplássið frá FCK**

ROYALA LIGAN

*Jóannes Hansen*

Hóskvøldið í síðstu viku varð tað greitt, at FCK eigur annað finaluplássið í fyrstu norðurlendsku fótbóltskappingini. Frammanundan var tað greitt, at IFK Göteborg skuldi eiga lut í finaluni. Tað gjørdist greitt, at FCK skuldi eiga hitt finaluplássið, tá ið Rosenborg ikki megnaði at fáa stig við til hús, tá ið teir vitjaðu í Malmö. Heimaliðið, Malmö FF, vann 4-2.

Finalan verður 26. mai, og hon verður spæld á Nya Ullevi í Göteborg. Har rúmast væl fleiri áskoðarar, enn tað gera á Gamla Ullevi, sum er heimavøllurin hjá IFK. At finalan skal spælast í Göteborg kemst av, at IFK stóð seg betri í bólkaspælinum, enn FCK gjørdi. Í bólkaspælinum hittust IFK og FCK tvær ferðir, og FCK vann báðu ferðirnar við 1-0.

Fleiri altjóða finalur hava verið spældar á Nya Ullevi. Tann fyrsta og ivaleyst mest minnisríka var í 1992, tá ið Danmark í EM finaluni sigraði 2-0 á Týsklandi.

Royala finalan er seinasti møguleikin hjá FCK at vinna nakað skreyt í ár. Í Svøríki enda teir kappingarárið á heysti. Higartil í hesum kappingarárinum eru seks umfør avgreidd, og IFK er á sjeynda plássinum.

# Andrew aftur á blettinum

**Tað tódnaði eitt vet í toppinum, men tað skal vilja heilt illa til, um Johan Byrial Hansen og Horsens ikki eftir summarsteðgin verða partur av superliguni**

DANMARK 1./2. DEILD

*Jóannes Hansen*



*Andrew av Fløtum spældi allar 90 minuttirnar og skoraði, tá Fremad Amager vitjaði hjá Vejle um vikuskiftið*

Undan teimum báðum landsdystunum, sum standa fyri framman fyrst í juni, tykist Andrew av Fløtum rættuliga at hava fingið høvdið fyri seg í Fremad Amager. Tá ið teir í vikuskiftinum vóru í Vejle, var Andrew allar 90 minuttirnar á vøllinum, og hann gjørdi beinanvegin um seg. Longu í fjórða minutti spældi hann liðfelaga púra leysan, men hesin kiksaði. Sjey minuttir seinni syrgdi Andrew við skoti úr stuttari fjarstøðu fyri, at Fremad Amager legði seg framum, men teir megnaðu ikki at halda tørn. Vejle vann 2-1, og teir fingu sigursmálið sjey minuttir undan dystarenda.

Jón Rói Jacobsen og liðfelagarnir í Frem vunnu 3-1 á heimavølli móti Nykøbing Falster Alliansuni. Gestirnir í Valby vóru frammanfyri í steðginum, men so setti Frem meiri ferð á, og fyrstu trettan minuttirnar í 2. hálvleiki skoraðu teir trý mál.

Horsens er framvegis oddalið, og tað skal vilja heilt illa til, um teir ikki fara at flyta upp. Fimm umfør eru eftir at spæla, og Horsens er fimm stig frammanfyri Frem, sum er nummar trý og ovasta felagið undir uppflytingar strikuni.

Hesa ferð vóru fleiri av lyklaspælarunum hjá Horsens skaddir. Uppgávan var stór, tí Horsens vitjaði SønderjyskE í Haderslev. SønderjyskE er næstfremst, og 1-0 sigurin á Horsens bar við sær, at teir framvegis eru besta boðið upp á fylgisneyta hjá Horsens upp í bestu deildina.

Køge leggur saman við Frem trýst á SønderjyskE. Hesa ferð var um reppið, at Køge ikki fekk fult, men í tíðini, sum dómarin hevði lagt afturat, skoraðu teir sigursmálið í Næstved, sum tapti 2-1. Danskir fjølmiðlar vita at siga, at tað nú enn eina ferð verður gjørd roynd at leggja tey bæði stóru feløgini í Køge kommunu saman. Hitt felagið er Herfølge. Fleiri ferðir áður hevur samanlegging verið upp á tal, men tað hevur kiksað hvørja ferð.

Í triði bestu deildini gekk einki serligt hjá Holsterbro og John Petersen. Teir taptu á útivølli 1-0 móti Næsby. Lyngby megnaði 1-1 á heimavølli móti Slagelse. Christian Lamhauge Holst var ikki í Lyngby hópinum.

# Árstalsfeløgini í finaluni

**B68 staðfesti sítt pláss, eftir at teir á útivølli høvdu fingið meiri enn annað beinið í finaluna, meðan B71 á heimavølli megnaði at vinna 3-0 og harvið at taka tað aftur, sum teir høvdu mist á Argjum**

FSK STEYPAKAPPINGIN

*Jóannes Hansen*

Tað vera tey bæði árstalsfeløgini, B68 og B71, sum fara at dystast í fyrstu finaluni í FSF steypakappingini, sum er roknað til tey, sum tíðliga missa lívið í kappingini um Løgmanssteypið, men sum ikki er heilt soleiðis nú, tá ið B68 framvegis er partur í báðum steypakappingunum.

Toftamenn høvdu vunnið 4-0 á útivølli móti LÍF. Tí var tað bara avgreiðslu spurningur, tá ið LÍF mánadagin var á Svangaskarði. B68 vann 3-0. Jóhan Petur Poulsen skoraði í 11. minutti, og hann økti til 2-0 í 53. minutti, meðan veteranurin Øssur Hansen, sum er vinstri vongverji hjá B68, staðfesti 3-0 sigurin, tá ið tað restaðu ellivu minuttir.

AB hevði 1-0 í viðførinum frá fyrru hálvfinaluni, tá ið teir fóru um Skopunarfjørð. Og í 1. hálvleiki høvdu spælararnir hjá Jóannesi Jakobsen møguleikar at økja um leiðsluna. Súni Fríði Barbá fekk besta møguleikan, men ungi B71 málverjin, Símun Rógvi Hansen, bjargaði, tá ið Súni Fríði royndi seg við brotssparki, sum málverjin hevði verið orsøk til.

Eftir steðgin var B71 omaná, og teir skoraðu trý mál. Clayton Soares, sum er sannur fongur á Sandi, og sum í 2. hálvleiki var miðvallari, meðan hann í 1. hálvleiki hevði verið í álopinum, skoraði fyrst tvey mál. Í 68. minutti sendi hann fríspark upp um stóra manngarðin frammanfyri René Tórgarð og í kassan, og í 70. minutti heilfluktaði hann sera hegnisliga dygst undir tvørtræið. Tummas Pauli Olsen staðfesti 3-0 B71 sigurin og harvið finaluplássið, tá ið tað restaðu fimm minuttir.

Finalan millum B68 og B71 verður leygardagin 2. juli.

# Rógvi og teir stjólu sigurin

**KR var undir støðugum trýsti, men kortini megnaðu teir at vinna á útivølli, tá ið teir skoraðu sigursmálið móti Fylkiri í 94. minutti**

ÍSLAND

*Jóannes Hansen*

Um Hvítusunnuna fór bólturin á rull í bestu íslendsku deildini. Fýra uppgerðir vóru 2. dag, og týskvøldið var grannastríð í Reykjavík, har Fylkir í Árbænum tók ímóti KR.

Har varð søga skrivað á tann hátt, at KR fyri fyrstu ferð nakrantíð hevði føroying á liðnum í landskappingardysti. Rógvi Jacobsen hevði vunnið sær pláss millum teir fyrstu ellivu, og hann var í álopsplássi alla tíðina.

Fylkir, sum í fjør endaði á fjórða plássi, legði bragdliga fyri. Í 5. minutti fingu teir brotsspark, sum varð umsett til mál. Í 17. minutti svaraði KR aftur. Eftir hornaspark vóru teir í Fylkiri so óhepnir, at teir stútaðu bóltin í egið mál.

Fylkir hevði stóra leikliga yvirvág, men KR málverjin var sannur brandur, og so bendi alt bendi á, at tað skuldi endað javnt. Men tá ið klokkan var farin fýra minuttir út um tey trý korterini í 2. hálvleiki, eydnaðist tað KR at skjóta sigursmálið.

Stuldur, mettu íslendsku miðlarnir, at talan hevði verið um. Mett varð, at Fylkir hevði havt sigurin so rudduliga uppibornan.

Hjá KR hevur annars gingið væl higartil í ár. Fyrsti landskappingardysturin var 12. KR sigurin á rað hjá KR, sum hevur spælt í steypakappingum og øðrum kappingum. Eitt nú vunnu teir í síðsta fyrireikingardystinum til landskappingina 1-0 í síðstu viku. Talan var um minnisdyst, og einasti málskjúttin ta ferðina var Rógvi Jacobsen.

Meistararnir av Hafnafirði, FH, løgdu sannførandi fyri. Teir vóru í Keflavík, har teir vunnu 3-0. ÍA av Akranesi hevði vitjan av Þrótti úr Reykjavík og ÍA vann 1-0. Valur vann 3-1 á Grindavík, og í Reykjavík vant Fram burturúr ÍBV úr Vestmannaoyggjunum. Úrslitið gjørdist 3-0.

Í næstbestu deildini vann Breiðablik, sum Hans Fróði Hansen spælir við, 2-1 á Haukar úr Kópavági. Hans Fróði hevur spælt flestu ferðirnar í fyrireikingunum til nýggja kappingarárið, men hesa ferð var hann ikki í hópinum hjá Breiðablik.